Run Flat Tyre:

# Bert til góðkendar bilar





**Alt fleiri bilar koma nú á marknaðin við RFT-dekkum, (Run Flat Tyre), sum eru gjørd til at kunna koyra eitt strekki upp á minst 80 kilometrar við 80km/t uttan luft. Hesi dekk skulu einans nýtast til bilar, sum eru góðkendir til RFT-dekk**

DEKK
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fleiri dekkverksmiðjur lýsa við RFT-dekkum, sum um at tey kunnu brúkast til allar bilar.

Goodyear hava í hesum døgum stórar sjónvarpslýsingar við nýggja RFT-dekkinum RunOnFlat. Samstundis vísa teir á, at hesi dekk kunnu setast á flest allar vanligar felgur, men at tey einans skulu nýtast til bilar, sum eru góðkendir til RunOnFlat-dekk.

Hesir bilar hava eina innbygda elektroniska ávaringarskipan, sum sigur frá um dekktrýstið fellur. Hetta fyri at ávara bilføraran um t.d. at okkurt av dekkunum missir lufttrýstið, so hann ikki koyrir við meira ferð enn 80 km/t.

Vandin liggur í, at um bilførarin ikki varnast at dekktrýstið ar fallið, kann hann koyra við t.d. 200 km/t á einum motorvegi í longri tíð, og tá kunnu dekkini blíva rættuliga heit og lívshættislig.

Hetta er vert at hava í huga, nú nógvir bileigarar fyrireika seg til koyring uttanlands.

RFT-dekkini eru uppbygd nakað annarleiðis enn vanlig dekk, t.d eru dekksíðurnar styrktar við gummi, sum kann bera vektina av bilinum, hóast øll luftin er likin út. Eisini eru dekkini gjørd soleiðis, at tey halda sær á felgunum undir koyring uttan luft.

RFT-dekk eru nú standard á nógvum av kendu bilmerkjunum.

*Kelda: Goodyear / Super Dekk*






# Lada Niva í Antarktis

**Í 1989 varð avgerð tikin um at testa ein Lada Niva í ekstremu umstøðunum í Antarktis. Bilurin, ið bleiv fyrsta flutningstól á hjólum í Antarktis, royndist so væl at hann nú verður settur á eitt savn í Ruslandi**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Eftir at bilurin varð testaður við sera góðum royndum, varð hann í 1990, eftir at hann hevði verið gjøgnum nakrar tekniskar broytingar, sendur av russisku Polar-støðini sum fyrsta flutningstól á hjólum í Antarktis.

Bilurin varð nógv brúktur av vísundamonnum. Í temperaturi millum -54 til +4 stig flutti bilurin ymiskan farm har ímillum vísindaliga útgerð og tryggjaði sambandið millum tær nærliggjandi polarstøðirnar, eisini við læknahjálp.

Tey fylgjandi árini komu fleiri aðrir bilar, bæði lastbilar og bilar til fólkaflutning til Antarktis, men Lada Niva bilurin kláraði seg eins væl og teir.

Nú er so avgerð tikin um at seta bilin á eitt savn í Russlandi.

# Mazda CX-7 kemur í 2006

**Konseptbilurin Mazda MX-Crossport, sum fyrstu ferð var sýndur fram á bilaframsýningini í Detroit í januar 2005, verður veruleiki í 2006. Navnið verður CX-7, og bilurin kemur fyrst á amerikanska marknaðin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mazda CX-7 er ein sonevndur Crossover, t.v.s. at bilurin er ein kombinatión av fleiri ymiskum biltypum við bæði sportsligum og SUV (Sport Utility Vehicle) eginleikum.

Í mun til longdina (463 cm) er CX-7 rættuliga breiður (193 cm), og hæddin er 163 cm. Bilurin er lægri og breiðari enn fleiri av kappingarneytunum og við lutfalsliga stórari aksilfrástøðu (279,5) kemur hann at liggja væl á vegnum.

Kabinan er bæði snøgg og sportslig við góðum plássi til fýra vaksnar persónar og teirra viðføri.

Í tíðindaskrivi frá Mazda eru ongar tekniskar upplýsingar, men væntandi verður talan um ein sportligan undirvogn og kvikar og sportsligar motorar.

Ikki er avgjørt enn nær Mazda CX-7, sum skal framleiðast í Japan, kemur á evropeiska marknaðin.



*Mazda CX-7 kemur á amerikanska marknaðin í 2006. Bilurin er bæði lægri og breiðari enn fleiri av kappingarneytunum við lutfalsliga stórari aksilfrástøðu og stórum hjólum*